# Reglugerð viðvíkjandi endurrindan av útreiðslum í sambandi við, at starvsfólk eru í tænastuørindum fyri Tvøroyrar kommunu

## Henda reglugerð hevur heimild í avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins um dagpening, dagfest 5. februar 2013

§ 1 - Skjalprógv

**Stk. 1.** Tá starvsfólk fara tænastuferð, og skulu hava endurrindað útreiðslur í hesum sambandi, skal fyriliggja skjalprógv uppá hetta. Tænastuferðirnar kunnu verða fundir, skeið ella innbjóðingar til onnur tiltøk, ið starvsfólk skulu luttaka í vegna Tvøroyrar kommunu.

**Stk. 2.** Skulu útreiðslur á einari farleið endurrindast í sambandi við tænastuferðina, skulu starvsfólk skjalprógva útreiðsluna við ferðaseðli ella kvittan fyri keyp av ferðaseðli.

§ 2 - Upphæddir

| | |
|---|---|
| **Stk. 1.** Tímapeningur, tá ferðin er styttri enn 16 tímar: | Kr. 15,00 |
| **Stk. 2.** Fullur dagpeningur: | Kr. 250,00 |
| **Stk. 3.** Náttarviðbót skjalprógva við rokning, tó í mesta lagi: | Kr. 650,00 |
| **Stk. 4.** Náttarviðbót, ikki skjalprógvað: | Kr. 230,00 |
| **Stk. 5** Lækkaður dagpeningur eftir 28 dagar, heruppí náttarviðbót: | Kr. 212,00 |
| Av hesum náttarviðbót: | Kr. 106,00 |
| **Stk. 6** Tænastuferð til Danmarkar dagpeningur: | Kr. 360,00 |

§ 3 – Meir-tímar = avspáking

Meir- tímar, sum starvsfólk hava í sambandi við tænastuferð, skulu so vítt gjørligt avspákast. Tó kunnu meir-tímar til tíður gjaldast út, um so er, at ikki er møguligt at avspáka ella avloysarin hevur ein meirkostnað.

§ 4 – Frádráttir av dagpeningi

**Stk. 1.** Eru starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu, sum hava rætt til dagpening, á skeiði ella líknandi, har matur er roknaður í skeiðsgjaldið (ella innbjóðingina), hava starvsfólk rætt til 40% av dagpeninginum.

**Stk. 2.** Eru ikki allar máltíðir roknaðar við í gjaldinum, verður drigið frá dagpeninginum soleiðis: Fyri døgverða 30% og fyri nátturða 30%.

**Stk. 3.** Er gisting roknað við í gjaldið fyri skeiðið, hevur starvsfólki ikki rætt til náttarviðbót ella endurgjald fyri gistingarhús.

§ 5 – Ferðing uttanlands

**Stk. 1.** Fyri tænastuferðir til Danmarkar er dagpeningurin kr 360 um dagin, eisini heimferðardagin.

**Stk. 2.**Fyri tænastuferðir uttanfyri ríkið verða reglurnar hjá uttanríkisráðnum nýttar.

**Stk. 3.** Full viðbót verður veitt upp til 28 dagar. Fyri longri tíð skal verða gjørd avtala um viðbót í hvørjum einstøkum føri.

**Stk. 4.** Reglan í § 4, er eisini galdandi fyri ferðing uttanlands.

§ 6 – Persónar, ið ikki eru starvsfólk hjá kommununi

Tá persónar, sum ikki eru í starvið hjá Tvøroyrar kommunu, eru í tænastuferð fyri kommununa, fáa hesir persónar fyri heilan dag kr. 1.800,- fyri mista inntøku. Skjalprógv skal fyriliggja fyri inntøkumissinum sambært § 1.

Tvøroyri, 4. november 2016

Kristin Michelsen

Borgarstjóri

Henrik Weihe Joensen

Kommunustjóri